# Glað og nøgd m











**Mánakvøldið í næstseinastu viku gjørdist eitt tað størsta vegamótið í lívinum hjá fýra bóndafamiljum og teirra mongu mjólkineytum og hjá føroyskum landbúnaði sum heild, tá fyrstu neytini vórðu slept leys í spildurnýggja felagsfjósinum í Havnardali**

*Orð og myndir*
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Eftir tógvið stríð, blóð, sveitta og tár, eydnaðist tað loksins í farnu viku teimum fýra bóndafamiljunum, sum hava tikið stig til eitt tað fremsta frambrotið innan føroyska landbúnað í mannaminni, at gera dreymin til veruleika. Tað hevur verið ein stór avgerð at skula fara frá tí vanabundna og heimliga umhvørvinum og so at savnast undir einum taki "langt" heimanífrá. Men teir fýra bóndurnir hava allir havt sama ynski: at kunna skapa nakað nýtt, nakað meira liviligt fyri bæði seg sjálvar, sínar familjur og neytini – vinnuna. Og loksins eydnaðist tað, tó at allar súðir ikki eru syftar, tí alt hetta nýggja skal sleppa at standa sína roynd, og so tað mest týðandi: nú skal verkætlanin vísa, um hon ber seg.

## Gleði og gleimur

Og tað var gleði og gleimur í fjósinum hetta mánakvøldið um sjeytíðina, tá fyrstu neytini komu av Velbastað. Tey komu úr fjósinum hjá Jóan Petur Brekkstein. Seinni komu øll hini við, neytini hjá Poul Müller, Tórfinni Dalsgarð og Páll Djóna á Steinum. Ætlanin er at minst 130 neyt skulu vera í fjósinum, sum frálíður.

Sosialurin og Rás2 vóru á staðnum ta stóru løtuna, tá lív kom í fjósið og tey fyrstu neytini fótaðu sær í nýggja heiminum. Hetta var ein sera kensluborin og spennandi løta ikki minst fyri tey, sum vara av.

## Fáa annað lív

Ella Müller, bóndakona: - Hetta er ótrúliga spennandi. Tað verður eitt annað lív vit nú fáa. Tað verður alt meira normalt, nú kann familjan verða meira savnað til vanligar máltíðir, høgtíðir, ja alt fer at verða, sum tað eigur. Vit vera so fýra familjur um hetta, og eg ivist onga løtu í, at tað fer at rigga. Men eg fari at sakna ljóðið frá neytunum heima við hús.

Og djóralæknin var eisini komin út í Havnardal fyri at vera partur av hesi spennandi løtuni. Lars Mohr Nielsen: -Hetta er av fínasta slag. Ja hetta er og verður framtíðin hjá føroyskum landbúnaði. Aðrastaðni er hetta eitt krav, at neytini ikki standa bundin alt samdøgrið árið runt. Her fara tey at standa leys, og tað er sera gott.

## Gott fyri øll

Og eisini fleiri av bóndabørnunum og vinmonnum teirra vóru við, eitt nú Bárð-